

# SkáaLán

## skái uttan skuldarkenslu

**Við SkáaLáni kanst tú:**

- leggja dustfalnar útbúgvingar-dreymar framaftur
- seta meira av til eftirløn
- reisa húsini av nýggjum
- ganga heima eina tíð
- renna ta dýru skuldina á dyr
- flúgva avstað við allari familjuni

**Skái uttan skuldarkenslu**

Eydnan er ikki altíð bara við endan á tunlinum; tað skal eisini bera til at njóta lívið á stundum møðsomu leiðini til munnan. Við hesum í huga bjóðar Føroya Banki sethúsakundum at velja sær skáa onkrastaðni í lánstíðini.

Men hetta er eingin vanligur skái. Velur tú at fáa ella leggja um til SkáaLán, fært tú eina munandi rentulækking við í keypið.



**Støkk inn á gólvið og fáa eitt skáaprát við ráðgeva tín í Føroya Banka. So fært tú sjón fyri søgn um, at vit geva tær betri ráð!**

FØROYA BANKI
www.foroyabanki.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Ráðhúsið

Stjórn kommununnar, t.e. borgarstjórin, kommunustjórin og trivnaðarstjórin, húsast í Ráðhúsinum.

Í hesum sambandi er felags stjórnarskrivstova og móttøka gjørd í ráðhúsinum, ið tú verður ein partur av.

Hinar deildirnar í Ráðhúsinum eru mentamáladeildin og starvsfólkadeildin.

- leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

# Reingerð- og tænastufólk til ráðhúsið

Søkt verður eftir fyrikomandi, fleksiblum og ágrýtnum fólki til starv í Ráðhúsinum, har høvuðsuppgávan verður at gera reint og annars gera aðrar fyrifallandi uppgávur.

Ein partur av starvinum er at skipa og hava eftirlit við reingerðini í øðrum bygningum í miðbýnum, umfram at vera við til at seta fólk og umsita avloysaraskipan. Harumframt kemur tú at taka tær av tilfarsgoymsluni og keypa inn eftir tørvi.

Fyri rætta fólkið er talan um eitt sjálvstøðugt, fjølbroytt og spennandi starv.

**Førleikakrøv**
Viðkomandi skeið og royndir. Neyðugt er at duga at brúka teldu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er 35 tímar um vikuna og lønt sambært sáttmálanum millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Havnar Arbeiðsgevarafelag. Viðbót verður veitt fyri ábyrgd. Arbeitt verður flextíð millum kl. 8 og 17.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 3. januar 2006. Viðmerk á umsóknina "tænastufólk".

FÆST UM ALT LANDIÐ




# Ein hent jólagáva

SKIPALISTIN **hevur lógarkravdan** føroyskan álmanakka